# Eina rósu til Sonju Klein og eina til Poul Michelsen

SVEND AAGE ELLEFSEN



Nógv er skrivað og nógv er sagt viðvíkjandi uppskotinum at banna niðring og niðurgering av fólki orsakað av teirra ílegum, hvat tí kynsliga viðvíkur.

Nógv eru tey, ið hava havt heilagu Bíbliuna á lofti, og í egnum rættvísi dømt hini samkyndu til illamann.

Ikki er tað sørt, at vit - sum einans síggja aktuellu lógarbroytingina sum útsaligt mannaverk, og ikki sum eina endurskoðan ella broyting av teirri heilagu skrivtini - at vit hava kent okkum illa farin viðvíkjandi viðurskiftum okkara við Várharra, tá vit taka undir við at verja *allar* teir minnilutar, sum lívið og søgan hevur lært okkum ofta verða illa viðfarnir.

Allur heimurin - uttan tey umráði, har víttgangandi fundamentalistar hava vald og ávirkan - hevur tikið undir við at verja fólk móti ágangi orsakað av húðarliti, átrúnaðarligari sannføring og kynsligari orientering.

Sjálvsagt eigur Føroya Løgting eisini at gera tað sama!

### Tøkk til prestin og fólkafloksmannin

Fyri mín part vil eg takka prestinum Sonju Klein fyri,at hon í greinini »Størstur er kærleikin« staðfestir í skrivt, at vit framhaldandi kunnu kalla okkum krinstin, og sostatt ikki verða send beinleiðis til helvitis, hóast vit fylkjast saman við hesum fólkunum, sum vilja verja eisini samkynda minnilutan!

Í Harrans húsi eru mangir bústaðir, so har verður eisini pláss fyri okkum, sum ikki megna at liva syndafrítt, men hava fyrigevingina og náðina fyri neyðini!

Men nú eg havi pennin í hondini, skal mín tøkk ikki minst fara til løgtingsmannin Poul Michelsen, aftur fyri at hann letur møguleikan opnan, at eisini vit - ið ikki blint fylgja Jenisi av Rana, Óla Breckmann og Billi Justinussen, tá umræður etiskar spurningar - at eisini vit framhaldandi kunnu teljast fólkafloksfólk.

Meðan floksfelagarnir allir undir tingviðgerðini traskaðu eftir teirri rásini, sum teir Jenis og Bill slóðaðu fyri teimum, stóð Poul einsamallur ímóti! Tú vart óført Poul, og siðiliga og væl grundgav tú fyri tíni støðutakan!

Nógv heldur er tað skyldan hjá einum frælslintum, borgarligum flokki at verja ein minniluta, enn at elta har fanatikarar slóða!

# Mørkini eru flutt

RICHARD DANIELSEN

Nú er aftur ein øgilig øsing um tey homosexuellu og tey, sum hava eina aðra meining enn tey.

Aftur verður lagt eftir teimum, sum vísa á at slíkur livháttur er skeivur, sambært skriftirnar.

Sagt verður, at fólk langa út við skriftstøðum. Undirtónin í tí er at tey, sum gera tað, hava ongan rætt at taka til einkult skriftstøð, tí at tað er ikki tað, ið skriftin vil siga, sum heild.

Fyrst skal eg vísa á, at Jesus, tá ið Hann varð álopin av djevulinum, vardi seg við stuttum setningum frá skriftini. Hygg t.d. at Matteus 4, vers 1-10.

Jesus talar eisini um at »ikki minsti bókstavur ella prikkur av lógini forganga, fyrrenn tað alt hevur hent«. Matt. 5,18. Hann sigur eisini hetta: »skriftin vikast ikki«. Jóhannes ev. 10,35.

Men vit eru keypt leys undan lógini og eru ikki undir lógini longur, so satt sum vit hava tikið ímóti Honum, sum okkara frelsara.

Men hvat sigur so nýggja testamenti um hesi viðurskifti. Er tað nú loyvt hjá tí, sum játtaar Jesus, sum sín frelsara at ikki bara at liva í slíkum syndum, men eisini at forsvara livimátan, sum nakað sum Gud góðtekur. Nei als iki. Tað er eingin ivi um hvat ápostlar Harrans læra um hetta. Tann, sum sigur nakað annað, kennir ikki bíblu sína.

Eg skal enda við nøkrum ómetaliga alvorligum orðum frá Rómbrævinum 1. kap. Har tosar ella skrivar Paulus um menniskju sum, hóast tey kendu Gud ikki ærdu Hann, sum tey áttu og hann sigur hetta: »Gud gav tey upp«. Her vil eg leggja vekt á at eg ikki ynski at skjóta eftir einstaklingum ella at niðurgera nakran. Tað, sum Paulus skrivar um her, er til heildina.

Men eg spyrji meg sjálvan, er Gud við at geva føroyingar upp og vesturheimin sum heild.

Synd hevur altíð verið í Føroyum. Siðloysi hevur altíð verið, men tað, sum nú gongur fyri seg í Føroyum og í Vesturheiminum, hevur ikki verið altíð. Siðloysi hevur tikið yvirhond, her meini eg ikki við eina ávísa synd, enn minni ávís menniskju, men mørkini eru broytt. Hegnini verða laksa niður av peningagjarnum fólki, sum sita og bryggja ósømiligar filmar saman og hetta verður sáða niður í børn og ung, just sum tey eru í ringasta aldri. Og ávøksturin sæst aftur við brotnum hjúnaløgum, lógloysi og frekleika, sum ongastaðni hoyra heima. Okkara egna sjónvarp er ikki undantikið.

*(Lesarabrævið er skrivað 6. oktober 2006, men av misgávum bleiv tað burturlagt. Vit biðja orsakað mistakið. Red.)*

# Mannarættindi

ÓLI JÓHANNES POULSEN

Tað er heilt
ótrúligt, at summir bólkar verða tiknir framum aðrar. Tá íð vit tala um mannarættindi skuldi ein trú, at vit hugsa um øll, teg og meg, uttan at fara longur inn í hetta kjakið.

Tá eg skrivi teg og meg meini eg øll, eisini okkum, ið roykja. Eg royki illa og veit at tað er ógvuliga ósunt, tað haldi eg at allir vit roykjarar eru klárir yvir. Men góðu tit, ið ikki roykja, hvat høvdu tit sagt við meg, um eg ein dag sá ein bumbu tjúkkan persón ganga við einum stórum ísi og át, hey tú halt uppat við hasum, hattar kemur at drepa teg, tú kostar eisini heilsuverkinum alt ov nógvar pengar?

Ella eg sá ein persón við hjartatrupulleikum, havt bløðtøpp, ella aðra vælferðarsjúku vælsignaði brúka beinini, tú kostar heilsuverkinum alt ov nógv, bara tí tú tímir ikki at ganga. Kemur tú inn á forhøllina á landssjúkrahúsinum sært hesi fyribrigdi dagligt. Tað løgna við hesum somu fólkum er, at tey standa og ilskast inn á okkum, ið mugu standa uttanfyri í kulda og kava, tí tað er ikki pláss inni á sjúkrahúsinum fyri okkum. Skal tað verða mannarættur í Føroyum, hava tit ikki loyvi at blaka okkum út úr einum almennum stað, uttan at tit versigóð fyrst hava skaffa hesum stakkals menniskjum eitt lítið roykirúm á hvørjari hædd, so hesi stakkals sjúklingar ikki verða blakaðir út at roykja. Nei tit tjúkku feitu og dovnu menniskju, takið fyrst í egnan barm, áðrenn tit koma eftir okkum, ið muga standa úti og njóta okkara last, meðan tit íð liggja innløgd vegna tykkara lastir, kunnu standa í forhøllini, við ísi og sjokulátu og ilskast inn á okkum. Nei tit tingmenn, tá ið tit fara at taka hattar málið 269 B. Hugsið eisini um okkum, tíðan verri stóra skara av menniskjum í enn roykja.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# ES limaskapur og altjóðagerðin

JOHAN DAHL

løgtingsmaður



Skal ein trúgva verljarakanningini sum Tjóðveldisflokkurin lat gera fyri stuttum, har spurt var, um Føroyar skuldu gerast partur av Evropasamveldinum, so er 1/3 ímóti, 1/3 veit ikki og 1/3 er fyri.

Hetta er í hvussu so er ikki í trá við tað, sum løgmaður sigur verða tann politiska veruleikan, nevniliga at stórur meiriluti er ímóti ES limaskapi.

Jú gamaní, um vit fara í Løgtingið at spyrja, so eru ivaleyst fleiri ímóti enn fyri, ikki tí at høvdið verður brúkt, men kanska meira hjarta og tvíhaldan um maktina hjá ávísum flokki um eitt ávíst vinnuligt øki.

Hvør er so politiski veruleiki føroyinga viðv. ES?

Tað vita vit als ikki!! Menn gita ístaðin fyri at taka um “ondets rod” og fáa greiðu á teimum vitalu spurningum sum eru m.a.

1. Hvørjar karmar koma vit at hava í ES samveldinum sum ES limur, ið er partur av Ríkisfelagsskapinum

2. Hvørjar karmar koma vit at hava í ES samveldinum sum limur við Fullveldið

Tá vit hava fingið m. a. hetta avklárað, saman við mongum øðrum spurningum, og harvið fingið kortlagt fyrimunir og vansar og fingið greiðu á okkara ivamálum, so eigur føroyski veljarin at fáa endaligu avgerðina.

Spurningar sum standa ósvaraðir eru millum annað:

Fiskivinnupolitikkin
– kunnu vit fáa seravtalu í ávíst tíðarskeið ella ei
Útbúgvingarmøguleikar
Ferðavinnan/upplivingarvinnan
Heilsuverk og heilsutænastur
Marknaðaratgongdir kring í heiminum
Gransking og granskingarverkætlanir sum vit kundu verið við í
Møguleikar okkara í rammuprogramminum hjá ES
KT og Fjarskiftisvinnan
Umhvørvispolitikkur
Osfr., osfr.

Partapolitisk seráhugamál størsta forðingin fyri einari viðger og opnari debat um málið.

Hví kemur fjáltur á menn tá orðið ES verður nevnt?

Hví ber ikki til í einum samfelag sum Føroyar at kjakast seriøst um ES limaskap og tað sum har við fylgir av fyrimunum og vansum og fáa lýst tey ymsu økini so vanliga fólkið eisini skilir hvat tað inniber?

Hví fer t. d . Fólkaflokkurin í svart bara orðið verður nevnt??

Hví vil Javnaðarflokkurin ikki sum arðir norðurlendskir brøðraflokkar, við opnum sinni fara inn í viðgerðina av hesum málið, men ístaðin í blindum søkir eftir EFTA limaskapið- fyri umvegis at fáa atgongd til ES?

Hví er bara ein lítil fraktión av Tjóðveldisflokkinum opin fyri at tosað um hetta mál?

Er tað tí at teir eru bangnir fyri at missað “suverenitetin” longur úr eygsjón?

Hví er Sambandsflokkurin einasti flokkur á løgtingið sum vil seriøst viðgera ES limaskap og mælir til hendan?

Sjálvandi tí at Sambandsflokkurin sær, at ES limasskapurin er neyðugur fyri áhaldandi at mennað okkara land og fólk og skapað bestu fortreytir í altjóða høpi og tær fært tú sum limur í ES samveldinum.

Fyri vinnu okkara vildu allar marknaðarforðingar verið burtur, fríhandilsavtalur í hópatalið og harvið opin marknaðaratgond til 90 lond og bilateralar avtalur við ca. 20 onnur lond.

Fiskivinnan sýnist sum størsti trupuleikin fyri at tosað um ES.

Fiskivinnan eigur ikki av verða forðingin fyri at vit fara í holt við at seta hol á hesa debat, men hvørja fer tosað verður um ES so verður sagt at okkara fiskivinnað tá er slept upp fyri skutil til arðar at válka sær við??

Hvør sigur at tað ikki verða nógv størri møguleikar fyri okkum sum fiskivinnutjóð í ES høpi?

Hvat við visjón 2015 vinnupolitikkinum sum samgaongan arbeiðir við, - er hann møguligur at gjøgnumføra um vit ikki hugsað stórt ??

Eg loyvið mær at ivast.

Vit eiga at verða politiskt búnir nokk til eisini at tora at seta ES kjakið á breddan onganti ov skjótt, um vit vilja verða eitt av heimsins bestu londum at búgva í 2015.